# Fleiri tiltøk á Torginum í Runavík

**Fleiri spennandi tiltøk verða á Torginum í Runavík nú um vikuskiftið. Eystanstevnan byrjar nevniliga í dag, og er nógv fjølbroytt á skránni**

EYSTANSTEVNA
*Ingrid Bjarnastein*



*Eystanstevnan verður hetta vikuskiftið hildin í Runavík við nógvum spennandi tiltøkum*
*Savnsmynd*

**Runavík:** Longu í kvøld, fríggjakvøld, byrja tiltøkini á Torginum í Runavík.

Okkara kendi countrysangari, Ragnar í Vík, fer at syngja countryløg í ein tíma frá klokkan 21-22.

Leygardagin klokkan 14 verður sjálv setanin av stevnuni. Sæunn Ólavsdóttir Hansen, setir stevnuna, og skrúgongan kemur frá Ítróttarhøllini og inn á Torgið. Nes Sóknar Musikkfelag spælir og Eystankórið skal eisini syngja. Tivoliøkið letur upp aftaná.

Tey vælumtóktu M´as Blues Band hava frá kl. 15.30 konsert og samstundis byrjar eitt stórt barnatiltak á Torginum við sjúkrabilum, brandbilum og møguliga eisini politibilum.

Seinni um kvøldið syngur sangbólkurin Salt, og aftaná verður sangmøti við dansiframførslu og øðrum. Tað er Keldan í Skálafirði, sum skipar fyri.

Hálvan tíma áðrenn midnátt spælir Nes Sóknar Musikkfelag, og á midnátt verður midnáttarsamkoma við luttøku av Eystankórinum, og Marja Lamhauge flytir fram røðu. Felagssangur verður sjálvandi eisini á skránni, og midnáttarsamkoman endar við einum braki, tí tá verður fýrverk sent upp í luftina.

Sunnudagin verður Magni Christiansen á Torginum frá klokkan 16. Spælimenninir spæla spælimanstónleik úr Norðurlondum, Hetlandi og USA frá kl. 17, og síðani kl. 19, verður skipað fyri ymsum kappingum av ítróttarfeløgum og skótum.

Seinast á skránni er ein sangløta klokkan 20 við Lívsins Orði.

### Annað

Sjálvandi er eisini nógv annað spennandi á skránni. Tivoli hevur sum vanligt opið, og fleiri fótbóltsdystir verða. Fleiri dystir verða hjá teimum yngru deildunum, og kl. 18.00 verður stevnudysturin millum NSÍ og grannarnar B68 á vøllinum í Runavík.

Málningaframsýning verður í býrássalinum við Anju Hentze og Karolinu Danielsen, eystanstevnukabarett, felagssangur í caféini í Hæddini við Jónsvein og Birgir eru nakað av tí, ið eisini er á skránni.

Fríggjakvøldið klokkan 22 er opið hús í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum og leygarkvøldið somu tíð, er opið hús í Berøa.

Rennikapping verður leygardagin kl. 15 fyri børn.

Fleiri konsertir verða eisini. Fríggjakvøldið verða stórar útikonsertir í grótbrotinum. Fyrst verður ein barna- og ungdómskonsert við luttøku av Brandi Enni, Arnfríð Lützen, Vit eru glað, Trølla Pæturi og ommuni. Hon byrjar klokkan 19.

Kl. 23 byrjar eystanstevnukonsertin í grótbrotinum við Gestum, All That Rain og Braquet.

Handilsmiðdepilin hevur mótasýning til báðar konsertirnar.

Sjálv stevnan endar so at siga við eini kvøldsetu í ítróttarhøllini í Runavík. Hilmar Jan Hansen og Robert McBirnie standa fyri undirhaldinum, og eisini verður Stjørna í eitt kvøld við næmingum úr Tofta skúla og Runavíkar skúla. Tónleikur og sangur er eisini á skránni, og tað er Mentanarhúsfelagð, sum skipar fyri.

# Familjan í Snarskivini

FRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*



*Kári Svensson sýnir í hesum døgum fram málningar saman við dóttrini Áslu Ránnvá fram í Snarskivuni í Havn*
*Savnsmynd*

Í gjár lótu Kári Svensson og dótturin, Ásla Rannvá Svensson upp listaframsýning á torginum í Snarskivuni.

Snarskivan, ið er avgreiðslan hjá Tórshavnar Kommunu, húsast saman við postavgreiðsluni í gamla posthúsbygninginum í miðbýnum í Havn. Hugnaliga forhøllin, sum verður kallað Torgið, verður eisini brúkt til framsýningar, sum mentamáladeildin skipar fyri.

Síðani Snarskivan lat upp, hava skiftandi framsýningar verið á Torginum, har føroysk listafólk hava sýnt fram, og nú er Torgið aftur karmur um enn eina framsýning. Hesuferð hjá Kára og Áslu Ránnvá.

Kári man teljast millum kendastu listarmálararnar í Føroyum, og dótturin Ásla Ránnvá, hevur luttikið á bæði ólavsøku- og várframsýningum. Nú verður høvið at síggja faðir og dóttir saman á hesi felagsframsýning.

Til ber at síggja listaframsýningina tá opið er í snarskivuni. Tað er mánadag – fríggjadag frá klokkan 9 á morgni til klokkan 16 seinnapartin. Tó er tað opið hósdag til klokkan 18.

## Verkskeið og konsertir

TÍÐINDASKRIV
*Suzukifelag Føroya*

Suzukifelag Føroya, ið er eitt felag fyri tónleikalærarar og næmingar, ið nýta Suzuki frálæruháttin, hevur í hesum døgum vitjan av Koen Rens, Wilfried van Gorp og Jeanne Janssens, ið eru violinlærarar úr Belgia. Í hesum sambandi verða verkskeið hildin í Vestmanna og í Tórshavn. Fríggjadagin 13. juni kl. 19.00 verður konsert hildin í Gøtugjógv, har næmingar og lærarar fara at framføra tilfarið, arbeitt hevur verið við í samband við verkætlanina. Konsertin er ókeypis.

# Fimm ymiskir vegir til Tórsvøll

GONGUTÚRAR
*Ingrid Bjarnastein*

Kunningarstovan í Havn skipar leygardagin 14. juni fyri gongudegi í Havn. Fimm ymiskir túrar verða á skránni, og byrjað verður á Vaglinum.

Teir ymsu túrarnir eru 1,5 – 8 kilometrar til longdar, og allir túrarnir eru av Vaglinum og niðan á Tórsvøll.

Stimbur byrjar klokkan 15 á Vaglinum hita gongufólkið upp. Borgarstjórin, Jan Christiansen, sendir gongufólki avstað eitt korter seinni.

Tá gongufólkið kemur niðan á Tórsvøll, spælir Havnar Hornorkestur, og gongufólkið fær høvi at strekkja út við Stimbur, meðan Jákup Magnussen sigur frá.

Beint eftir klokkan fimm halda Katrin Dahl Jacobsen og Sølvi Winther Olsen røðu.

Síðani fara gentur og dreingir úr Havnar Fimleikafelag at vísa síni fimleikakynstur, og aftaná syngur Havnarkórið og tað verður felagssangurin.

MBM bjóðar øllum teimum, sum fara til gongu Pop Top at leska sær við, og boða fyrireikararnir frá, at ongin tilmelding er neyðug. Tað einasta, ið kravt er, at fólk hava beinini við.






# Prísurin á fiski fallin minst 20%

**– Svartskygni er stórt allastaðni, so útlitini eru døpur, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum**

FISKAPRÍSUR
*Áki Bertholdsen*



*– Eg stúri fyri, at lønarhækkingarnar á landi, fara at trýsta fiskaprísin niður, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum*

– Tað sær svart út.

Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum sigur, at í komandi tíðum fer inntøkan hjá øllum, sum hava við fiskivinnu at gera, at fella munandi.

Hann sigur, at hesa seinastu tíðina er prísurin á fiski fallin minst 20% sum heild.

Hann sigur, at tað er prísurin á marknaðinum, sum vit selja fiskin til, sum er nógv fallin seinastu tíðina.

Hetta er galdandi fyri allan fisk, líka frá rækjum til flakið av flakatrolarunum.

– Og tá ið prísurin á heimsmarknaðinum fellur, ávirkar tað prísin ígjøgnum øll liðini, heilt til avreiðingarprísin.

Tí er eisini avreiðingarprísurin, sum føroysk skip fáa, eisini nógv lækkaður av tí sama.

Hann nevnir, at avreiðingarprisurin á stórum toski er ikki meiri enn 20-22 krónur kilo, men hann skuldi helst ligið uppi á 26-28 krónum, men hann var heilt uppi á yvir 30 krónur fyri kilo.

Á minni toski, hevur avreiðingarprísurin verið yvir 20 krónur kilo, men nú er hann ikki meiri enn 14 krónur fyri kilo.

Og á Upsa er avreiðingarprísurin farin niður í helvt, tí nú er hann ikki meiri enn einar tríggjar krónur fyri kilo.

Jákup Sólstein sigur, at hetta fer at merkjast í øllum samfelagnum, tí inntøkurnar hjá teimum, sum hava við fisk at gera, fara at lække munandi, samstundis sum inntøkurnar hjá skipunum eisini fara at lækka munandi.

Jákup Sólstein sigur, at tað ringasta er, at sum heild eru útlitini í longdini onki serlig.

– Allastaðni, haðani vit frætta, er svartskygni rættiliga stórt, tí búskapirnir í londunum, sum vit selja til, er farin at rilla og summastaðni er búskapurin næstan steðgaður og tað trýstir prísin niður á marknaðinum og so mugu øll liðini í fiskivinnuni, heilt aftur til sjálv skipini, fylgja við.

Hann væntar tó, at í heyst fara prísirnir at vera eitt sindur betri aftur, enn teir eru nú.

Og hann vísir eisini á, at skipini hava havt nøkur góð ár nú, so nakað er at standa ímóti við hjá teimum flestu.

– Men standa tær vánaligu tíðirnar við, elle versna tær enn meiri, er tað skjótt uppi, leggur hann afturat.

### Rokningin endar á einum staði

Jákup Sólstein stúrir fyri, at nú lønirnar á landi eru hækkaðar, fer tað eisini at ávirka avreiðingarprísin.

– Allar rokningar enda á einum staði og tað er á avreiðingarprísurnum. Prísurin á lidnaru vøru hava fiskavirkini í Føroyum als onga ávirkan á, tí hann verður avgjørdur í marknaðarlandinum. Fáa fiskavirkini øktar útreiðslur er sostatt bara ein máti at vinna peningin innaftur og tað er at lække útreiðslurnar. Og tað kann bara gerast upp á tveir mátar og tað er antin at rationalisera ella at lække prísin á rávøruni.

– Tí er tað avgjørt ikki til gagns fyri fiskaprísirnar, at lønirnar eru farnar upp og eg stúri fyri at tað fer at trýsta avreiðingarprísin enn longri niður, sigur Jákup Sólstein.

Hann sigur, at hvussu nógv prírirnir fara at lækka av hesum ávum, veldst eisini um kappingarførið hjá virkjunum.

# Útflutningurin av fiski: Marknaðurin í skeljasori

**– Fiskaprísirnir á marknaðinumeru falnir í botn og tað er ómetaliga tungt at selja fisk nú, sigur Meinhard Jacobsen á Føroya Fiskavirking**

ÚTFLUTNINGUR
*Áki Bertholdsen*



*– Tað er ómetaliga trupult at selja fisk í løtuni og ongin dugir at síggja nakrar glottar fyri framman, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Fiskavirking*

– Marknaðurin er í skeljasori.

Føroya Fiskavirking er ein av teimum stóru fiskaseljarunum Og stjórin har, Meinhard Jacobsen, sigur, at tað er ómetaliga tungt at selja fisk í løtuni.

Hann sigur, at tað er nakað síðani at marknaðurin fór at svíkja og at hann nú er í botni.

Og hann leggur afturat, at tað er ringt at fáa eyga á nakran glotta fyri framman.

– Alt gongur ímóti okkum í løtuni. Búskapurin niðri í Evropa er steðgaður og vit ganga ímóti summarinum, og tá verður ikki nógvur fiskur etin.

– Og tá ið tað so fellur saman, at marknaðurin er vánaligur frammanundan og at summarið nærkast, verður tað bara so mikið verri og tað er støðan í løtuni, sigur stjórin á Fiskavirking.

– Og fyri at fáa stein oman á byrðuna, gjørdi verkfallið tað, at vit vóru heilt úti av marknaðinum í fýra vikur.

– Men at gera metingar av, hvat freamtíðin hevur at bjóða, er heilt ómøguligt, leggur hann afturat.

Hann sigur, at búskapirnir í teimum londum, vit selja til, eru undir hørðum trýsti og í Evropa eru tíðirnar við at versna aftur og tað ávirkar eisini fiskaprísirnar.

### Ávirkar prísirnar nógv

Meinhard Jacobsen sigur, at hetta fer sjálvsagt eisini at ávirka avreiðingarprísin rættiliga nógv, men tøl vil hann ikki seta á, tí tað veldst um, hvønn fisk, talan er um.

Hann vísir ikki aftur, at støðan á summum virkjum hjá Fiskavirking kann gerast líka hættislig sum støðan hjá flakvirkjunum í Hvalba og á Eiði, sum eru í vanda fyri at lata aftur.

Men hann vil heldur ikki seta nøvn á virki.

– Vit hava akkurát ligið eitt metlangt verkfall av okkum. Og tað fyrsta, vit mugu gera, er at royna at lappa viðurskiftini aftur við tey viðskiftafólk, sum kanska enn tíma at bíða eftir okkum.

– Men tað er alt annað enn lætt, serliga hesa árstíðina er tað trupult.

Meinhard Jacobsen sigur, at verkfallið er ikki júst fremjandi fyri umdømið hjá Fiskavirking úti í heimi.

– Tá ið vit eru úti av marknaðinum so leingi aftur í ár, eftir at vit eisini vóru úti fyri tveimum árum síðani, bøtir tað ikki um álitið.

– Og júst álitið hevur ein sera stóran týdning, serliga tá ið marknaðurin er vánaligur, tí álit er ikki nakað tú fært, tá er nakað tú vinnur tær, sigur hann.

Er tað so verkfallið, sum ger støðuna so vánaliga, ella er tað vánaligur marknaður?

– Tað veit eg ikki. Men tað er heilt greitt, at er marknaðurin vánaligur, fara viðskiftafólk okkara at brúka tað sum eina umbering fyri at leita aðrastaðni, at vit eru so óálitandi leverandørar.

– Tað sigur seg sjálvt, at viðskiftafólkini brúka tað, at vit ikki hava kunna leverað til tíðina, til at trýsta prísin so langt niður sum gjørligt.

Meinhard Jacobsen sigur, at tí hevur verkfallið skrykt beinini undan Fiskavirking. Og tá ið marknaðurin frammanundan er ógvuliga trupult, er tað ikki óhugsandi, at endin verður, at okkurt virki má lata aftur.

Hann sigur, at sum støðan er í dag, verður nógv framleitt á goymslu og tað er lítil framtíð í tí.

Samstundis er summarið í hondum og skjótt fara virkini hjá Fiskavirking fara í summarfrí um stutta tíð og tá liggja tey aftur still.